# Merking av fiski

**Jákup Sverri, túrur nr. 2244**

**Tíðarskeið: 28/9-3/10 2022**

**Ábyrgd:** Petur Steingrund

**Endamál:** *Høvuðsendamálið við túrinum er at kanna ferðing og vøkstur hjá ymsum fiskasløgum á føroyska landgrunninum.*





## Samandráttur

Hetta var árligi merkingartúrurin á føroyska landgrunninum, har tilsamans 831 fiskar hjá 7 fiskasløgum vóru merktir. Av hesum vóru 758 toskar. Nakrir toskar á Mýlingsgrunninum vórðu tiknir til Umhvørvisstovuna til kanningar av eiturevnum.


## Um túrin

Vit loystu av Havnini kl. 19:00 onskvøldið hin 28. september. Túrurin byrjaði vestan fyri Suðuroynna sama kvøld kl. 23:00, har vit høvdu 8 hál og merktu 52 toskar. 29. sep. royndu vit norð úr Bakkanum. Her var fiskaríið betri og vit merktu 253 toskar á 5 hálum. Kl 21 góvust vit vegna vánaligt veður, og sigldu norðurum og lógu bakk í 1 døgn. 1. og 2. oktober royndu vit norðan- og eystan fyri Fugloynna, vit fingu væl av hýsu, men sera lítið av toski. Merktu frá 3 – 24 toskar per hál. Seinastu hálini eystanfyri blivu gjørd eystur/suður úr Skorini. Har merktu vit 147 toskar 8 hálum. Vit endaðu túrin á Mýlingsgrunninum, har vit høvdu 2 hál. Tilsamans høvdu vit 48 hál, umleið 1 tíma hvørja ferð. Veðrið var gott 2 teir fyrstu dagarnar, og vánaligt restina av túrinum.

## Prøvatøka

Tilsamans 831 fiskar vóru merktir. Tað mesta var smáur toskur (Talva 1).

Talva 1. Fiskur merktur á túri 2244.

| Slag | Tal | Miðallongd (cm) | Miðalvekt (g) |
|---|---|---|---|
| Toskur | 758 | 57.4 | 2315.5 |
| Upsi | 34 | 41.1 | 917.4 |
| Reyðsprøka | 21 | 53.6 | 2271.9 |
| Hýsa | 10 | 47.0 | 1185.0 |
| Havtaska | 5 | 43.8 | 1670.0 |
| Tunga | 2 | 41.0 | 970.0 |
| Kalvi | 1 | 31.0 | 340.0 |
| Tilsamans | 831 | | |

### Reiðskapur og onnur útgerð

Stjørnutrol við 100 mm meskum í posanum. Vágslemmar. Breitlalongin var 60 m, Rockhopper grunnur.

Ein pistól var nýtt til at festa Floymerkini við. Sergjørd karskipan til merking av fiski. Mátibretti. Vekt. Klokka. Skriviútgerð og teldur.

### Viðmerkingar

Ongar.

### Fólk við frá Havstovuni

Regin Kristiansen, Rúni Akralíð, Marit Pedersen og Poul Vestergaard (toktleiðari).